## DAGSINS MEINING

# Umhvørvi og tilvitska

Útvarpið hevur havt sera áhugaverda samrøðu við mann, sum nýtir stóran part av orku síni til at virka fyri øktum umhvørvismedviti og tilvitsku um náttúruna. Finnbogi Joensen í Vestmanna hevur æruna av, at hugtakið "grønur skúli" er komið inn í føroyskt mál. Í fleiri ár hevur hesin maður virkað ótroyttiliga fyri at vekja áhuga hjá børnum og vaksnum fyri umhvørvi og náttúru, og kann hetta virksemi ikki yvirmetast. Vit hava nógv at takka hesum manni fyri. Og verður eru hetta heldur ikki seinastu orð vit hoyra frá honum. Tíverri eru alt ov fáir føroyingar, sum vilja brúk tíð og orku uppá nettup umhvørvismálið, men ein glotti er so at hóma, at røddir eru frammi á tingi um at raðfesta málið hægri.

Føroyska náttúran er stórbar og hugtakandi. Hetta ger, at vit kanska í tí dagliga ikki geva okkum far um, at náttúra okkara ikki er "stór". Hon er í roynd og veru lítil, soleiðis at skilja, at hon tolir ikki nógv av. Menniskjan við sínum ótroyttiliga virkisfýsni ávirkar alla tíðina nátturu og umhvørvi. Við vatnorkuútbyggingina fingu vit reina orku, víst so. Men samstundis hvurvu stór og rík náttúruøki, sjáldsamar urtir hvurvu med alla, og fuglasløg í hópatali mistu síni livistøð. Vit kundu nevnt mong onnur dømi um, at framburður kostar náttúruni dýrt. Seinasta dømið er Lítlihólmur á Trongisvágsfirði. Onnur dømi er tann stóra útstykkingin hjá Tórshavnar býráð í Hoyvíkshaganum. Øll unna vit teimum ungu at seta búgv, men vit hugsa ikki um prísin, nevniliga, at eitt hitt ríkasta øki til heiðafugl í landinum hvørvur eftir einum degi so at siga. Vit kundu hildið fram: vegagerð, havnagerð, útstykkingar, frárensl í vøtn og áðir – alt terur uppá náttúruna. Fyri ikki at tosa um alt fóðurið frá alingini, ið er við til at dálka firðir og sund.

Tað er tí sera umráðandi, at vit læra at fara væl um tað, sum eftir er. Í hesum høpi er uppvaksandi ættarlið lykil til hugburð, ið fevnir um náttúru- og umhvørvistilvitsku. Av hesi orsøk eiga vit at fegnast um, at vit eiga fólk, sum virka fyri øktari tilvitsku um náttúru og umhvørvi. Men tað er ikki nóg mikið, at einstaklingar og feløg eru virkin. Hetta er eisini og ikki minst ein uppgáva hjá foreldrum og skúla. Tað er tí at vóna, at slíkar sendingar, sum tann vit her hava sipað til, fara at fáa foreldur og skúlafólk til at gera teirra besta til tess at venja børn og ung at fara væl um og vera góð við okkara náttúru. Tað er so satt sum ofta sagt, at nátturuna hava vit bert til láns frá okkara eftirkomarum. Hetta eiga øll at hava í huga. So halt fram Finnbogi. Spírar tínir geva og fara at bera ávøkstur. Kanska onkrir av okkara politikarum hava hoyrt tín boðskap og taka hann til sín. Miðlarnir eru til fyri m.a. at byggja brýr og fáa boðskapir og góð mál út til fólkið og politisku skipanina. Hetta málið eigur ikki at vera undantakið, heldur regulin.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Norðurlond – ein heildarmarknaður á mentanarøkinum

**Helga Hjörvar**



Mentanarsamstarvið millum Norðurlond er fjøltáttað, og hesin táttur hevur tikið seg nógv fram frá seinna veraldarbardaga fram til dagin í dag. Vit hava fylgt við mentanarøkinum hjá hvørjum øðrum og sæð hvussu norðurlendskar listaútbúgvingar og listastovnar hava verið ment og útbygd. Listafólk og fólk í leiðandi størvum hava havt høvi til at samskifta á fjølbroyttan hátt, og tey hava greitt hvørjum øðrum frá sínum egnu royndum. Tað hevur borið til at geva út bøkur, vísa filmar og fáa vitjanir av leikpallum, tónlistarfólki og listaframsýningum úr hinum Norðurlondunum. Fyrr var samstarvið millum hesi londini eyðkent av vantandi kunnleika, men nú er veruleikin ein heilt annar.

Norrøna ráðharranevndin og svenska ríkisstjórnin, sum hetta árið hevur formansskapin í Norðurlandaráðnum, hava gjørt av at beina burtur tær samstarvsavmarkingar, ið norðurlendsk landamørk hava elvt til. Fyrrverandi danski forsætisráðharrin, Poul Schlüter, hevur átikið sær at arbeiða við hesum, og hann er longu komin rættiliga langt. Harvið hevur hann avsannað ta mytu, at í norrønum samstarvi verður meira gjørt av at kanna og koma við tilmælum enn at fáa nakað veruligt á skaftið.

Úrslitið av hesum, og tann sannroynd, at Poul Schlüter heldur á at arbeiða við uppgávuni, er orsøkin til, at eg havi hug at vísa á eina gongda leið til at menna norðurlendska list; at mynda ein heildarlistamarknað fyri øll Norðurlond. Í dag er t.d. lættari at senda eina myndlista-framsýning úr Íslandi, Føroyum ella Grønlandi til Danmarkar enn til Noregs. Orsøkin er tann, at Danmørk er limur í ES, sum er ein marknaðarheild. Av somu orsøk er ikki neyðugt at fara gjøgnum stirvin tollkervi, tá ið ein leikpallur ella ein myndlistaframsýning verða send millum Finnland, Svøríki ella Danmørk, men tá ið framsýningin kemur til Noregs og haðani víðari til Svøríkis renir tú teg í ein veruligan tollmúr. Her mugu broytingar verða framdar, og alneyðugt er, at gera øll Norðurlond til eina marknaðarheild á mentanarøkinum. Ein onnur orsøk til tørvin á hesum, er tann sannroynd, at eitt nú tolltryggingartreytir kunnu forða smærri leikhúsum, listaframsýningum ella einstaklingum at gera seg galdandi í norðurlendskum høpi.

Verða Norðurlond ein heildarmarknaður á mentanarøkinum, hevði tað bøtt munandi um skatta-viðurskiftini hjá listafólki. Nógvastaðni verða listafólk skrásett sum sjálvstøðug vinnurekandi, og sostatt verður tann listaliga inntøkan mett at vera við til at fíggja skapanargongdina. Í tráð við hetta átti at borið til at skatta listafólk í heimlandinum, tá ið verk teirra verða nýtt í hinum Norðurlondunum, og sostatt høvdu vit fingið ein heildarlistamarknað í Norðurlondum. Hetta hevði havt veruliga stóran týdning fyri mong listafólk og ikki minst fyri ymsar mentanarstovnar, ið høvdu sloppið undan eini ørgrynnu av pappírsarbeiði.

Eyðkennandi fyri Norðurlond sum heild er, at list og mentan er fyri øll. Kortini er tað so, at um vit skulu megna at nýta enn betur ta megi, ið listin hevur, mugu vit hyggja at grannalandinum, Írlandi. Har hevur dentur verið lagdur á at hjúkla um skapandi list og at geva mentanarøkinum sersømdir. Við hugburði, ið líkist tí írska hugburðinum, høvdu Norðurlond kunnað stuðlað stovnum og einstaklingum, ið arbeiða heilhugað og á framfýsnan hátt fyri at útvega íbúgvunum høvi at uppliva stór metanartiltøk. Í teimum lítlu samfeløgunum er trupult at útvega nóg nógva inntøku við einans at selja atgongumerki, og har høvdu slíkar sersømdir havt serliga stóran týdning. Á henda hátt hevði borið til at bjóða útjaðaranum fjøltáttaða mentan, og harvið høvdu vit stuðlað fólki at búleikast á teimum meira fjarskotnu økjunum. Hetta hevði haraftrat ført við sær, at fjølmiðlar høvdu givið hesum økjunum størri ans, og í kjalarvørrinum av tí veksur ferðavinnan í býum, londum og hjá tjóðum, ið annars hava trupult við at gera um seg í alheimshøpi.

# Sól og brim í Smiðjuni

FRAMSÝNING

Petur Prent man vera ein av teimum mest trúgvu framsýnarunum í Smiðjuni í Lítluvík hesi mongu seinastu árini. Komandi dagarnar verða hann og listaverk hansara aftur at síggja inni í tí hugnaligu og fjálgu smiðjuni í miðbýar-hjartanum. Við ikki færri enn 32 listaverkum bjóðar Petur okkum at síggja sól og brim, mánalýsi, Hoyvíkina, Gásadal og Gøtu sand soleiðis sum sum listamaðurin sjálvur hevur upplivað tað. Talan er um 10 tekningar og 22 oljumálningar. Øll verkini eru gjørd í hesum árinum. Framsýningin er opin frá 25. til 28. oktober allar dagar frá klokkan 15 til 19.




**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



# Eg ætli ikki at skjóta Kristian Magnussen

**Sjúrður Skaale**



Javnaðarflokkurin kundi uttan iva samstarvað við fleiri flokkar á løgtingið. Men tað krevur, at floksins umboð sissa seg, og halda uppat við at seta onnur í bólk við bølmennum og mordarum

Ikki so sjáldan hoyrast øgilig láturbrøl inni av skrivstovuni hjá Tórbirni Jacobsen á Christiansborg. Tá vita vit, sum sita tætt við, at hann mestur hevur funnið uppá onkra garrvilla søgu, ið hann hevur fingið onkran at trúgva uppá.

Soleiðis er maðurin. Hann er ikki altíð so hátíðarligur og alvorligur. Hann elskar skálkabrøgd. Og tað, hann finnur uppá, kann eisini mangan vera ógvuliga stuttligt.

Men fyri nøkrum mánaðum síðani, stutt áðrenn eg skuldi til Sardinia at halda fyrilestur fyri felagsskapinum hjá statsleysum europeiskum tjóðum, var skemtið dekan og groft. Tá hevði Tobbin sent Dan Klein ein teldupost við teimum tíðindum, at eg skuldi til Sesilia at halda fyrilestur fyri ETA og IRA. Og so bað hann Dan ringja til mín at frætta meira.

Tað gekk ikki long tíð til Dan ringdi. Eg fortaldi sjálvsagt blaðstjóranum at hetta var tað reina gass, og sendi honum eisini skránna fyri ráðstevnuna á Sardinia, so eingin ivi skuldi vera.

So skuldi tað verið úti av verðini.

Men tað var tað ikki.

Dan prentaði teldupostin hjá Tobbanum, og gjørdi nógv burturúr. Men hann prentaði tíbetur eisini tað, sum eg segði við hann. Og síðani havi eg ikki hoyrt um nakran, sum hevur tikið søguna í álvara. (Uttan Lisbeth L. Petersen, sjálvandi. Men hvat skal mann vænta...)

**Drápsmenn á tingi**

Men tá fíggjarlógin var til viðgerðar á løgtingið, var annað skil. Tá segði Kristian Magnussen soleiðis av tingsins røðarapalli:

»Vit onnur kundu passandi spurt um sambandið millum Tjóðveldisflokkin og ETA, ein reinan terroristfelagsskap, sum Tjóðveldisflokkurin nú hevur forlovað seg við niðri í Italia. Kanska kundi formaður Tjóðveldisfloksins greitt Føroya fólki frá, hvat hetta sambandið gongur út uppá. (...) Eg kundi gott hugsað mær at vitað forholdið millum Tjóðveldisflokkin og ETA. Hvat vit kunnu vænta okkum her heima.«

Seinni segði Kristian soleiðis um orsøkina til, at hann spurdi:

»Eg spyrji tí at skrivarin á fólkatingssessinum há Høgna Hoydal hevur verið niðri í Italia onkustaðni og hildið fyrilestur fyri ETA millum annað um frælsisstríðið hjá Tjóðveldisflokkinum í Føroyum. Tí spurdi eg: Hvat er sambandi millum ETA og Tjóðveldisflokkin. Tí tað er eingin loyna, at ETA er ein rein terroristorganisatión, sum skýggjar demokrati heldur enn pestin. Tey drepa øll sum stenda í vegin, vinir og fíggindar, alt tað tey sleppa. Eg spyri hvat sambandið er millum tykkum.«

**Kristian verður ikki dripin**

Kristian Magnussen skemtaði ikki. Hann ljóðaði bæði álvarsamur og skelkaður og rasandi illur á málinum.

Men Kristian visti, at hetta ikki passaði. Tað hevði eg jú gjørt greitt longu í somu útgávu av Oyggjatíðindum, har tann famøsi telduposturin hjá Tobbanum stóð. Og tað er hóast alt eg og mín ferð til Sardinia, sum alt hetta snýr seg um.

Eg kundi aldrin droymt um at havt nakað sum helst samband við ETA. Felagsskapurin hevur dripið yvir 800 fólk, og eg havi størstu andstygd fyri honum.

Kristian spurdi á løgtingi »hvat vit kunnu vænta okkum her heima«. Men hann hevur einki at óttast. Eg havi ongar ætlanir um at drepa hvørki Kristan Magnussen ella nakran annan. Dráp og terror liggur mær ógvuliga fjart.

Hetta veit Kristian útmerkað væl. Men hvat eg, høvuðspersónurin, meinar og sigur, tað leggur hann ein lort í. Hvør sannleikin er, er Kristiani eitt feitt. Alt má víkja fyri endamálinum: At seta Tjóðveldisflokkin í samband við bølmenni, drápsmenn og diktatorar.

Og Kristian er ikki einsamallur. At javnaðarmenn seta fram púra sjúkligar ákærur móti Tjóðveldisflokkinum, hevur verið gerandiskostur nú í eini seks ár. So seint sum undir umrøddu fíggjarlógarviðgerð royndi Katrin Dahl Jacobsen eisini at samanbera Høgna Hoydal við Hitler.

Eg veit ikki hvat Javnaðarflokkurin ætlar við konstant at liggja og spræna hetta eitur út í samfelagið. Men tað gagnar ongum.

Gott hevði verið, um menn fóru at samstarva í staðin fyri at liggja og goysa svávul úr sær. Eg ivist ikki í, at Javnaðarflokkurin kann samstarvað við bæði Tjóðveldis- og Fólkaflokkin um nógv. T.d. nýggja útspæl Javnaðarfloksins um tjóðskaparliga semju. Men tað verður trupult, so leingi Kristian, Katrin og øll hini ikki royna at sissa seg.

# Frá Erasmus Montanus til talibanus

## - við lip service ella loysingarskrøggi sum mantra!

**Regin Eikhólm**



Undir yvirskriftini: "Útspilling spillir fólkaræðið" hevur varaløgmaður, Høgni Hoydal, eina viðmerking í Dimmalætting og Sosialinum 09.10.01, har hann átalar tað støðugt vaksandi útspillingina í politiska orðaskiftinum, og sum hann sigur ikki kann góðtakast.

At útspilling veruliga spillir fólkaræðið er varaløgmaður eitt gevandi dømi um, nú hann et al. í 3-4 ár hevur gingið á odda í eini grundleysari útspillingar herferð ímóti øllum tí, sum hevur samband við okkara 600 ára gamla ríkisfelagsskap. Tí man fáur taka hesa viðmerking frá varaløgmanni fyri annað enn lip service ella innantóm orð. Bara at vilja seg sjálvan er ein fólkaræðislig spilla í sjálvum sær og hevur onki við virðiligt fólkaræði at gera.

**Donsk imperialisma?**

Kenda parolan hjá varaløgmanni um at danir og ríkisfelagsskapurin eru rótin til alt ónt heldur áfram, sjálvt eftir at "Frágreiðingin um 80-árini" frítók danir og ríkisfelagsskapin fyri miseruna.

Heldur ikki núverandi málkøni stjórin á loysingarblaðnum Fregnir helt seg ov góðan til í síni móðurmálsgrein í tí annars ópolitiska mentanarálitinum "Avmarkaður Marknaður" 1996, at skíra danska samskiftið við Føroyar fyri "donsk imperialisma" endurtikið heili 5 ferðir ( s. 52,53 og 56), samstundis sum vælkenda hálovanin ella rættari kanoniseringin av teimum proloysingarhugaðu verður sett í fokus. Imperialisma er kúgan og vald yvir fremmandum landi og fólki. Men eins og í øðrum propagandamateriali verður als einki sagt um nakað alternativ, hvussu vit føroyingar uttan at vera partur av ríkisfelagsskapinum høvdu kunna ment og uppgraderað okkum til tað, vit eru í dag – eitt frælst og framkomið samfelag.

Okkara 600 ára gamli ríkisfelagsskapur hevur dugnað og stuðlað alt frá uppskrivingum og innsavningum til útbúgvingar av øllum handan slag. Við rúmsáttum arbeiðsumstøðum gjørt tað møguligt hjá eitt nú V. U. Hammarshaimb og okkara lærdu annars, at fáast við eitt táverandi breyðleyst ítriv, men sum seinni skuldi vísa seg sum kjølurin undir okkara máli og mentan. Ríkisfelagsskapurin hevur eisini dúgliga stuðla útgávum og veitt styrk til listarligar føroyskar úrmælingar – uttan mun til teirra politiska lit! Men gráa tøkkin: "Donsk imperialisma" – segði nakar útspilling?

Tað at vit føroyingar eru tvímálsligir og ikki bert hava heimamálið at líta á eigur ikki at geva málkønum nationalistisk kompleksir, tí so hevði verið synd í 70% av heimsins íbúgvum, sum verða roknaðir fyri at hava minst tvímálsligan førleika.

Í Indonesia eru til dømis yvir 13.000 oyggjar harav 4.000 við búseting og 200 móðurmál – øll undir einum aðalstýri, men tey hava helst ongan loysingarministara á lønarlistanum enn?

**Nationalistiskur verbalkøstur**

Eingin átala hoyrdist frá varaløgmanni, tá ein av loysingar sjefideologunum uttan fyri Hotel Hafnia uppí anliti á Nyrup samanbar Nyrup við Hitler, ella tá maritimi mentamálaráðharrin í Sosialinum skírdi Nyrup fyri ein svínhund. Nei, síðani varaløgmaður trein á politiska loysingarpallin við sínum danifoba hugburði, er tað líkasum vorðið alt meiri legalt at seta niðrandi nøvn á ikki loysingarsinnaðar føroyingar og heldur ikki her tróta orðini í nationalistiska verbalkøstinum: quislingur, landasvíkjari, danskaravinur, ikki rættur føroyingur v. fl..

Hinvegin kunnu vit tó kanska frøast um, at tað endiliga er gingið upp fyri varaløgmanni, at tað er ein heimur uttan fyri hansara narsistiska loysingarspegil, nú stórur partur av Føroya fólki í fleiri fylgjandi meiningarkanningum hevur vent loysingarpolitikkinum hjá honum baki.

**Lip service ella loysingarskrøgg sum mantra**

Sum ein annar Erasmus Montanus, ið ikki kendi til tær grundleggjandi logisku fortreytirnar og tí gjørdi falska niðurstøðu, legði varaløgmaður hart út í Sjónvarpi Føroya tá hann visualiseraði danska skurkin í bankasakini við eftirgjørdum myndum, men niðurstøðan var følsk smb. "Frágreiðingina um 80-árini." Niðanfyri nøkur dømir sum tala fyri seg.

* Lyftið til Føroya fólk frá varaløgmanni og løgmanni ultimo 1998 um breiðan meiriluta fyri nýskipanaruppskotinum varð ikki hildið og danir fingu skyldina.

* Loysingarrópini um at føroyingar fáa tað nógv betri uttan fyri ríkisfelagsskapin halda ikki, tí livifóturin lækkar smb. stjóran á hagstovuni!

*Uppáhaldið, um at danir tjena meir uppá Føroyar enn blokkurin kostar teimum, er ongantíð ávíst og er ikki eftirfarandið smb. serkønum!

*Føroyar hava hvørki brúk fyri Nato ella ríkisfelagsskapinum, var niðurstøðan hjá loysingarfylkingini, men terrorin hevur lært okkum annað, og uttan trygd frá ríkisfelagsskapinum fleyg Atlantic Airways helst ikki í dag.

*Flestu "rættu" føroyingar ynskja loysing frá Danmark verður sagt, men hetta er ikki rætt smb. meiningarkanningum!

*Føroyar skuldu gerast bíligari at reka við effektivisering, men eru vorðnar dýrari, eisini ein skeiv fortreyt.

*Pengar hava ikki so nógv at siga í einum fullveldis Føroyum, onnur virðir telja meiri, heldur varaløgmaður uppá, men politikaralønirnar eru hækkaðar til tað dupulta og pensiónin til landsstýrismenn er vorðin 5 falda tað Palliba fær. Heldur ikki her hanga orð og gerningar saman, og soleiðis kundu vit hildið áfram við at tikið úr dreymaheiminum hjá loysingarfylkingini. Teirra hugsjón er on/off, og hevur tíverri hvørki nú ella tey seinastu 50 árini havt rygg til vanliga fólkaræðisliga viðgerð.

Varaløgmaður hevur við lip service ella loysingarskrøggi sum mantra (heilagt orð/útsagn frá guru) gingið uttanum fólkaræðisliga atferð og snarað politiska leikpallinum frá eini nýskapandi Erasmus Montanus konfiguratión til eina sjálvsøkna talibanlíknandi rørslu við elimentum, sum okkara fólkaræði hevði verið ríkari fyriuttan!

Samríkissinnaða andstøðan tykist at hava sannað, at " med ræv skal man ræv fange", og tí kastar eisini hon til tíðir úr tí nationalistiska verbalkøstinum. Hetta er eitt "nødvendigt onde" men er í longdini óvirðiligt og spillandi fyri okkara fólkaræði.

Men varaløgmaður liggur sum hann hevur reitt, og átti fyrst at sópa fyri egnum durum, áðrenn hann vendir sær til onnur. Hann átti at vita, at við oratoriskum førleika fylgir ábyrgd og misbrúk av professionellum fjølmiðlaførleika er helst størsta hóttanin ímóti okkara aldargamla fólkaræði!